

## Millum fremstu tjóðir

Tað eru nógvir fyrimunir í tí at vera eitt lítið land. Eitt nú er tað munandi einfaldari at broyta eitt lítið samfelag skjótt og fáa tað á eina kós, vit ynskja. Vit kunnu røkka ómetaliga nógv til 2015 – um vit vilja og um vit velja at gera tað. Tað krevur av okkum, at vit flyta nøkur mørk – fyrst av øllum mørkini í okkara egna hugaheimi.

Visjón 2015 er við til at flyta hesi mørk, so vit skapa ein sterkan búskap og eitt skapandi og vitandi samfelag, har vælferðin hjá øllum borgarum er tryggjað.

Føroyar eru ein gróðrarblettur við ríkum tilfeingi – menniskjaligum og náttúrugivnum. Alheimsgerðin gevur okkum ótaldar nýggjar møguleikar at troyta, um vit lata okkum eggja heldur enn at verða forðað av stórum avbjóðingum. Lyklaorð eru skapanarevni, vitan og vilji!

Eg fari við hesum at takka strategibólkunum og øllum, sum hava lagt stóra orku í arbeiðið við Visjón 2015.

Í felag røkka vit málinum. Stevnan er sett móti fremstu tjóðum!



Jóannes Eidesgaard
løgmaður